## Súni stóran leiklut

Tað gongur einki serligt hjá teimum báðu føroysku landsliðsspælarunum at vinna sær pláss ímillum teir fyrstu ellivu á besta AaB liðnum. Um vikuskiftið átti Súni Olsen stóran leiklut á næstbesta liðnum. Hann verður sagdur at hava verið millum teir stinnastu, tá ið AaB í 2. deild vestur vann 3-1 á útivølli ímóti Vanløse. Súni Olsen átti málgevandi sendingina, tá ið AaB eftir hálvan tíma javnaði til 1-1, og miðskeiðis í 2. hálvleiki staðfesti hann við fínum máli 3-1 sigurin. Hetta var fyrsta ferðin í hesum kappingarárinum, at Vanløse tapti á heimavølli. Í superliguni fer AaB mánakvøldið at spæla á heimavølli ímóti Esbjerg.



## Laudrup tapti aftur

Eftir at Getafe, sum hevur danan Michael Laudrup sum venjara, vann í UEFA Cup kappingini hóskvøldið, var tað aftur gerandisdagur í sponsku kappingini í gjár. Getafe spældi ímóti Racing Santander og tapti týdningarmikla dystin 2-0. Harvið er framvegis stórt trýst á Michael Laudrup, og Getafe hevur bert vunnið ein av 9 dystum í sponsku landskappingini í ár.

# Nýggj dagsskrá er longu sett

**Meðan FM rákin svinnur, verður stórur dentur lagdur á fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Landskappingin 2007 er av. NSÍ hevur fingið FM steyp og gullkrónur og atgongumerkini til innleiðandi umfarið í europeisku meistarakappingini. Harvið hevur NSÍ tryggjað sær eina stóra millión frá UEFA. Europeisku pengarnir verða ikki fluttir til NSÍ fyrrenn á sumri í 2009, men sjálvandi ber tað til at brúka hesar pengarnar sum trygd longu nú.

FM rákin í Runavíkar kommunu kennist framvegis, og í fleiri feløgum er rákin av vónbrotið framvegis ramur. Ikki minst í gomlu stórfeløgunum:

Í KÍ, har dagsskráin tíðliga á árinum var ein heilt onnur, enn tað hevði verið vónað og ivaleyst eisini roknað við. Uggin var, at flaggskipið so dánt fótaði sær fram ímóti kappingarenda.

Í HB, har grundarlagið undir stórliði undan kappingarbyrjan kendist væl betri, enn tað gjørdist undan kappingarbyrjan í fjør, tá ið liðið vann FM. Men HB stórkiksaði, og tapið í steypafinaluni og fjórða plássið í landskappingini er langt frá tí, sum tað altíð verður vónað og roknað við í felagnum, sum hevur vunnið meiri enn nakað annað.

Í B36, sum leingi var í tættari kapping við NSÍ um FM heitið, men sum fall púrasta í fátt fram ímóti kappingarenda og eftir svíðandi tap í grannauppgerðini leygardagin datt heilt aftur á bronsuplássið. Tað var stórt vónbrot.

### Gott lag

Í fimm feløgum eigur lagið at vera í topp, tí liðini stóðu seg so avbera væl:

50 ár eftir stovnanina hevur NSÍ vunnið fyrsta FM heitið. Tí er lagið í toppi í Runavík.

Í Sundalagnum varð roknað við, at tað fór at verða striltið eftir vónbrotið í fjør. EB/Streymur er steypavinnari, og silvurkrónurnar í landskappingini vórðu leygardagin vunnar við manér. Tí er lagið gott í Sundalagnum.

Í Gøtu er lagið gott. Í summar var GÍ í vanda fyri at flyta niður. Kortini megnaðu gøtumenn at sleppa út djúpum aldudali og fram á 5. plássið. Tað var framúr.

Málið var at halda tørn um plássið í fremstu røð, sum B71 vann sær í fjør, og tað eydnaðist. Sandoyingar endaðu á 8. plássi, og avrikini vístu, at tað eru fleiri møguleikar í sandoyingunum og stuðlunum, sum teir hava uttanlands frá. Tí er fótbóltslagið gott á Sandi.

Skála endaði á sætta plássi. Fyrstu umførini vóru katastrofal, og hóast úrtøkan ikki hevur verið nakað serlig í heyst, so er sætta plássið væl og virðiliga at liva við.

### Royna aftur

AB og VB/Sumba eru ikki longur partur av Formuladeildini. Tað er longu langt síðani, at niðurflytingin meiri og minni varð veruleiki. Merkisvert hevur verið, at bæði liðini – hóast vónbrotið – ikki hava lagt árarnar inn.

Sammett við undanfarin ár hava botnliðini ikki lagt rygg til fleiri stórtap. VB/Sumba hevur tvær ferðir tapt við fimm málum – 5-0 í Klaksvík og 6-1 í Streymnesi – og størsta AB tapið var 4-0 í Gundadali ímóti HB.

B68 og ÍF fáa í 2008 møguleikan at vísa, at uppflytararnir ikki nýtast at flyta niður aftur beinanvegin – í hvussu so er annar teirra.

Uttan mun til hvør flytir niður næsta ár, so tykist tað rættuliga sannlíkt, at tey bæði, sum fluttu niður í ár, skjótt fara at bjóða seg til aftur í fremstu røð.



*NSÍ var á gullferð í Klaksvík leygardagin. Men hóast smakkurin av hesum enn situr hjá spælarum, venjara og leiðslu, so eru tankarnir longu nú savnaðir móti komandi kappingaári*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Pengarnir avgerandi

Onkur spælaraflyting er longu kunngjørd, og næstu dagarnar fara fleiri at frættast. Í átta feløgum hava teir gjørt av, hvør skal vera venjari. Í vikuskiftisblaðnum varð víst á, at talan er um átta føroyskar venjarar, og at sjey teirra – allir uttan meistaravenjarin Johan Nielsen – eru í tríati árunum.

Felags fyri allar átta er, at teir – saman við landsliðsvenjaranum – eru útbúnir í Føroyum. Tað vil siga, at miðvísa arbeiðið at útbúgva venjarar, sum FSF fór undir fyrst í níti árunum, í ríkt mát hevur borið frukt.

Hvør fær bestu venjararnar, og hvør fer at fáa undirskriftirnar frá bestu spælarunum valdast nógv um, hvar mestu pengarnir eru at finna. Um nakrar vikur verður farið undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið.

2007 er søga, og nú fer fótbóltsprátið at snúgva seg um 2008.

# 75 túsund fyri FM troyggju

**NSÍ skoraði 250.000krónur, tá ið troyggjurnar hjá FM liðnum vórðu seldar á uppboði undir móttøkuni leygarkvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hvussu nógv kann tað hugsast, at virðið er í einari brúktari fótbóltsblusu. Sum í so mongum øðrum førum valdast tað um útboð og eftirspurning.

Tá ið NSÍ ferðalagið leygarkvøldið í góðum hýri kom aftur úr Klaksvík við FM steypi og gullkrónum varð skipað fyri móttøku í ítróttarhøllini í Runavík. Har møtti nógv fólk upp, og lagið var gott.

Seinastu árini hevur tað verið siður, at troyggjurnar hjá NSÍ spælarunum í Formula deildini hava verið seldar á uppboði. Tað plagar at vera stuttligt, og tað plagar at geva ikki so lítið í felagskassan.

Leygarkvøldið vórðu troyggjurnar seldar, og tað sást aftur á eftirspurninginum og harvið prísinum, at talan var um meistaratroyggjur.

Størsti spenningurin var, tá ið troyggjan hjá liðformanninum og ivaleyst mest støðuga NSÍ spælaranum í ár varð seld.

Tveir kappbjóðaðu upp á troyggjuna hjá Óla Hansen. Annar var mammubeiggin, gamli NSÍ álopsspælarin Símun Danielsen, sum arbeiðir í familjufyritøkuni OCD. Hin var Fritleif Olsen, sum er vinnulívsmaður og formaður í nevndini fyri Eik.

Síðsta boðið átti Símun Danielsen. Hamarin fall fyri boðnum upp á 75.000 krónur. Tá ið kappbjóðingin var avgjørd, bað Fritleif Olsen um orðið. Hann takkaði NSÍ fyri gott kappingarár, ynskti tillukku við FM heitinum, og so handaði hann felagnum kekkin upp á 50.000 krónur, sum hann hevði í lummanum. Tí er tað ikki heilt skeivt at siga, at troyggjan hjá liðformanninum gav felagnum 75.000 krónur og harafturat 50 túsund krónur ella í alt 125.000 krónur!

Næsthægsti prísurin fekst fyri málmanstroyggjuna hjá nú fyrrverandi NSÍ málverjanum Jens Martin Knudsen. Hægsta boðið ta ferðina átti SeaStar, sum rindaði 36.000 krónur í NSÍ kassan fyri troyggjuna.

Tilsaman gav uppboðið umleið 250.000 krónur, sum bæði feløg og privatir stuðlar rindaðu. Kanska hetta var eitt hugskot at royna hjá øðrum feløgum!